# Soleiðis sleppa øll at spæla við

**– Í amerikanskum gentufótbólti hava tey spælt tríggjar ímóti trimum í 20 ár, og í dag er USA á odda í heiminum, tá tað kemur til kvinnufótbólt. Allar royndir vísa, at slíkt spæl fostrar nógvar og góðar spælarar, sigur Per Ravn Omdal, norskur og europeiskur fótbóltsleiðari, sum var heiðursgestur á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum í ár**



Per Ravn Omdal brúkti eina talvu, har hann við talandi tølum vísti, hvussu stórur vøksturin í norskum fótbólti hevur verið síðstu 30-40 árini

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum, sum var á Hotel Hafnia í Havn leygardagin 21. februar, var 61 ára gamli norðmaðurin, Per Ravn Omdal, serligur heiðursgestur. Hann hevur bæði í norskum, europeiskum og altjóða fótbólti røkt álitissessir á hægsta stigi, og er tí veruliga eitt stórt navn í fótbóltsheiminum.

Har hevði hann ein fínan og hugvekjandi fyrilestur um, hvussu tey í Norra hava borið seg at við barnafótbóltinum, so tey í dag eru fremst í gentufótbólti og saman við Hollandi fremst í dreingjafótbólti, tá talan er um talið á íðkandi, samanborið við fólkatalið.

Per Ravn Omdal vísti á, hvussu stórur vøksturin í Norra hevur verið. Frá í 1971 at hava havt 3.100 fótbóltslið eru tey í 2008 komin so langt, at tey nú hava yvir 27.500 lið. Hann fortaldi, at tá tey í 1976 góvu gentum loyvi til at spæla við, vóru bara 50 íðkandi gentur, men at í 2008 spældu 112.500 gentur fótbólt í Norra.

**Spurdu børnini**

– Onnur orsøkin til samlaða vøksturin er sjálvandi, at vit lótu genturnar sleppa uppí. Hin orsøkin botnar í teimum broytingum, vit tóku stig til, eftir at vit í 1983 gjørdu eina kanning millum 4.000 norsk skúlabørn, har vit spurdu tey, hví tey spældu fótbólt og hví tey góvust við at spæla, segði Per Ravn Omdal.

– Tey, sum ikki sluppu upp í part, men sótu á bonkinum, góvust skjótt. Hetta var ikki tað, vit ynsktu at hoyra, men hetta var veruleikin. Um tveir vinmenn vóru á sama liði, har annar slapp at spæla og hin sat á bonkinum, so góvust báðir, tí vinarlagið var sterkari enn sjálvi aktiviteturin.

At vinir vildu heldur vera saman við sínum vinum, enn at spæla fótbólt saman, segði Omdal vera sum eina útpurring, ið gjørdi, at tey fóru í holt við at lata børnini spæla sjey ímóti sjey, tí tá sluppu øll at spæla og tað slapst undan, at summi alla tíðina máttu sita á bonkinum og hyggja at, meðan hini spældu.

– Samstundis settu vit forboð ímóti bara at lata tey bestu spæla og hini sita á bonkinum, tí vit vildu hava, at øll skuldu sleppa at spæla líka nógv. Nógvastaðni eru tað venjarar og foreldur, ið tvinga gomlu skipanina ígjøgnum, tí tey bara vilja vinna, sjálvt um børnini fyrst og fremst vilja vera saman – og harnæst vilja spæla fótbólt saman, segði hann.

**Uppalandi arbeiði**

Per Ravn Omdal heldur fótbóltin hava ein fyrimun, bæði í Norra og úti í heimi, tá roynt verður at gera vart við seg í politisku skipanini, tí nakað verður gjørt fyri børn og ung. Tað virðismeta politikarar virðismeta og geva nakað fyri, tí hvussu besta manslíðið klárar seg, vigar einki aftur ímóti uppalandi arbeiðinum.

– Í seks ár hevði eg ábyrgd av politisku viðurskiftunum hjá UEFA mótvegis ES, og eg var í Brüssel tvær til tríggjar ferðir um vikuna. Allir politikarar og embætismenn, eg tosaði við, høvdu børn ella onkran í familjuni, sum spældi fótbólt, og tí kendu tey til sosiala og uppdragandi arbeiði, fótbólturin ger, sigur hann.

– Sjálvur vaks eg upp í 50-unum og 60-unum, og var altíð við pápa mínum til fótbólt, meðan mamma mín tók tær báðar systrarnar hjá mær við til fimleik. Í dag er so nógv broytt, at í øllum førum onnur systir mín hevði spælt fótbólt. Fótbólturin er ikki longur nakað, sum líkasum er millum faðir og son, men meira nakað, sum er fyri alla familjuna.

**Børnini glaðari í dag**

Omdal er ikki í iva um, hvat ger munin, so fótbólturin kann verða nakað fyri øll. Tað er, at farið verður burtur frá, at tað altíð skulu vera 11 á hvørjum liði, tí við skipanum, har børnini spæla sjey ímóti sjey, fimm ímóti fimm og enntá trý ímóti trimum, gevast nógv fleiri møguleikar og pláss fyri øllum.

– Tá eg var átta ára gamal,